# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



## TØKK

Fyri sýnda samkenslu og hjálp, tá elskaði maður, góði pápi, verpápi og abbi

**Bergur Petersen**

andaðist 27.10.2009.



Takk fyri vitjan av manskórinum, vinum og familju. Og hospice fyri tykkara hjartaliga hátt at vera um okkum øll.

***Eyðgerð, børnini við familju***

## TØKK

Hjartans takk tit øll, sum vístu samkenslu og hjálpsemi, tá ið elskaða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Elsebeth Kristina Joensen**

So brádliga varð tikin frá okkum og heim til Harran. Takk tit øll, ið sendu heilsanir, ringdu og komu inn á gólvið, sendu blómur, kransar og gávur til Tvøroyrar kirkju. Takk tit øll, ið vóru um hana á Suðuroyar Sjúkrahúsi hennara stuttu sjúkralegu. Takk Jónsvein prestur fyri troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni og takk tit øll, ið fylgdu henni til hvíldar undir Akurgerði.

***Fyri tey avvarðandi***

***Inga, Johan og Pederbjørg***

"Tí at hvør tann, ið biður, hann fær, og tann, ið leitar, hann finnur, og tí, ið bankar uppá, skal verða latið upp fyri."

Matt. 7,8

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum mintust okkum á gullbrúdleypsdegnum.
Takk fyri blómur, gávur og heilsanir.
Og takk fyri hugnaliga samveru og gott undirhald.

**Bestu heilsur Karolina og Ansgar Lenvig**

# Mary J. í Garði, stjóri í Nærverkinum, fimmti

Týsdagin 4. mai 2010 varð Mary J. í Garði, stjóri í Nærverkinum, fimmti ár.



Mary er ættað av Strondum og fór sum ung til Havnar í studentaskúla. Mary giftist við sínum ungdómskærleika Bergi í Garði. Saman eiga tey børnini Cristian og Mariu.

Mary er úbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur og starvaðist nøkur ár innan hetta yrki. Harafturat hevur hon kandidatútbúgving í strategi, organisatión og leiðslu.

Mary hevur seinastu nógvu árini havt leiðandi størv, har hon m.a. hevur verið controllari hjá sjúkrahússtjóranum, settur sjúkrahússtjóri á Landssjúkrahúsinum, fíggjarstjóri í Almanna- og heilsumálaráðnum og fíggjar- og starvsfólkaleiðari í Fiskimálaráðnum.

Í 1999 varð Heimarøktin og Serforsorgin sett á stovn, og Mary varð sett sum stjóri. Stovnurin var ein samanlegging av Heimarøktini, Heimasjúkrasystraskipanini, Heilsufrøðiskipanini fyri børn og Serstovnadeildini fyri autistar og menningartarnað. Í 2003 varð eisini Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin og Deildin fyri sinnisveik løgd til stovnin. Í 2009 varð Heilsufrøðiskipanin flutt til Heilsumálaráðið, meðan økið Børn & Ung varð flutt til Nærverkið.

Í september 2006 fekk samanlagdi stovnurin navnið Nærverkið.

Nærverkið er í dag Føroya størsta arbeiðspláss við umleið 1600 starvsfólkum, ið veita tænastur til ein stóran part av borgarunum í Føroyum – bæði ung og gomul.

At hava evstu ábyrgd av einum so stórum stovni er dagliga ein stór avbjóðing, ið Mary við sínum dugnaskapi, nærlagni, blíða lyndi og diplomatiska famferðarhátti megnar sera væl.

Tá tað til tíðir leikar hart á, m.a. tá krav er um sparingar, kemur hennara innara styrki til sjóndar, og megnar hon at stýra støðuføst gjøgnum brotasjógvarnar.

Við hennara professionalismu og væl grundaðu avgerðum hevur Mary megnað at gera Nærverkið til ein vælvirkandi tænastumiðdepil, har allar Nærverkstænasturnar í dag hava ein felags samleika.

Samfelagið setir stór krøv til almennar vælferðartænastur. Eyðkennið hjá Nærverkinum er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika, og tí er neyðugt áhaldandi at menna starvsfólkini. Aðalmálið hjá Mary er at tryggja, at viðskiftafólkini fáa best møguliga tænastu.

Mary er sera tilvitað um, at fyritreytin fyri at kunna veita eina góða tænastu er, at starvsfólkini trívast og eru nøgd. Hon leggur tí áherðslu á at tryggja góðar arbeiðsumstøður. Hon er nærverandi og umhugsin og er altíð til reiðar at lurta.

Vit ynskja Mary hjartaliga til lukku á degnum og góð ynski fyri framtíðina.

**Starvsfólkini á Meginskrivstovuni**

# Merkisdagar

**Diamantbrúdleyp**

Fríggjadagin 7. mai hava Jóhanna og Johannes Ingvard Petersen á Saltnesi diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**Silvurbrúdleyp**

Týsdagin 11. mai hava Irena og Ronald Olsen á Nesi silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 15. mai í Missiónshúsinum Tabor á Toftum frá kl. 10 til 16. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**

Týsdagin 22. juni hava Bodil og Eliesar Finnsson, Hólavegur 23, Porkeri, silvurbrúdleyp. Veitsan verður fríggjakvøldið 25. juni kl. 19 á Hotel Øravík, tey ið vilja gleða okkum at koma, verða biðin at siga frá á tlf. 373860 ella 227496.

**Brúdleyp**

Leygardagin 8. mai giftast Fríða Ellingsgaard og Eyðfinnur Bjarnason Joensen, Eiði. Vígslan verður í Eiðis kirkju kl. 9. Brúdleypið verður á Hotel Føroyum kl. 11 fyri innbodnum.

**Brúdleyp**

Leygardagin 8. mai giftast Liljan Vatnhamar Olsen, Argir og Villiam Jensen, Skálavík. Vígslan verður kl. 14 í Vesturkirkjuni. Brúdleypið verður fyri innbodnum í Róðrarneystinum kl. 19.

**Brúdleyp**

Leygardagin 15. mai giftast Maiken við Skipá og John Pedersen, Havn. Vígslan verður í Filadelfia í Havn kl. 14. Veitslan verður hildin á Hotel Føroyum kl. 19 fyri innbodnum.

## Tøkk

Hjartans tøkk til tykkum øll, sum mintust okkum á gullbrúdleypsdegnum 29. januar 2010. Tøkk fyri gávur, blómur og heilsanir. Tøkk til tykkum sum hildu dagin saman við okkum. Tøkk fyri harmonikuspæl. Ein serstøk tøkk til okkara elskaðu børn og familjur teirra, fyri at gera dagin til nakað heilt serligt fyri okkum. Við ynskjum um alt tað besta framyvir.



**Heilsan Ingibjørg og Olfert Debes**